# Alt tað nýggjasta fæst hjá Einari Mikkelsen

**El-innleggjaravirkið S/pf Einar Mikkelsen fevnir eisini um um lampubúð. Tá handilin lat upp í 1955, var hetta fyrsti handil í Havn, ið burturav seldi lampur og er handilin í dag fremst á økinum**




Alt innan el-innleggjaraarbeiði hevur S/Pf Einar Mikkelsen at bjóða, men eisini innan lampur er handilin í oddinum, og verður hann neyvan tikin, tá tað ræður um at hava tað nýggjasta á hesum øki.

## Gomul fyritøka

Í 1949 byrjaði Einar Mikkelsen (Einar í Dávastovu) sjálvstøðugt el-innleggjaravirksemi og fekk hann løggilding frá SEV í 1954, tá ið SEV varð stovnað.

Við 55 árum á baki og eini góðari ballast og longum og drúgvum royndum innan el-yrkið, hevur virkið í gjøgnum tíðina gjørt nógvar stórar og umfatandi el-innleggingar kring landið.

Í 1955 lat handilin upp fyri fyrstu ferð og var hann tann fyrsti handil í Tórshavn, sum burtur av seldi lampur.

Í dag má handilin sigast at verða førandi innan allar lampur við einum stórum og tíðarhóskandi úrvæli.

Í 1980 fekk virkið limaskap í størstu lampuketuni í Danmark-Elbodan.

Eftir ættarliðsskifti í 1980 er tað í dag Høgni B. Mikkelsen el-innleggjari sum er stjóri, og rekur virkið saman við konuni Sonju.

## Allar loysnir

Einar Mikkelsen er ein av góðu og gomlu fyritøkunum í Havn, og av sonnum ein Havnarmynd. Ein kann neyvan hugsa sær, at handilin ikki altíð hevur verið, har hann er.

Og við góðsku og góðari tænastu er hetta ein væl rikin fyritøka, ið hevur 55 ár á baki, men sum aldur ikki merkist á.

Handilin er avgjørt í fremstu røð, tá um lampur og ljós umrøður og er limur í størstu lampuketuni í Danmark, Elbodan.

El-deildin hevur nógv at bjóða:

El-innleggingararbeiðið, bæðið við stórum og smáum el-arbeiðum. EDV- net. ADK-skipanir (hurðaeftirlitskipanir). AIA - skipanir (stuldarávaringarskipanir sum lúka treytirnar fyri at kunnað tilsetast góðkent vaktarstað). ABA-ABDL-skipanir (aut. eldávaringar & eldhurða afturlatingarskipanir). ITV-skipanir (skipanir við yvirvakingartólum). ARS-skipanir (køvigasskipanir). Termograferingar.

Fyritøkan er limur í el-innleggjarafelagnum í Keypmannahavn ELFO

## Góðkenningar

Einar Mikkelsen setur trygd og dygd í hásæti og hevur neyðugu góðkenningarnar.

Virkið hevur løggilding hjá SEV í samband við el-innleggingarvirksemið

Virkið hevur løggilding frá Brunaumsjón Landsins í samband við eldávaringarskipanir og køvigasskipanir.

8 fólk arbeiða hjá s/pf Einar Mikkelsen. Til ber at vitja heimasíðuna www.einar-mikkelsen.fo

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















